## **Heilagi Andin skuldi koma** (Jóh.16.12-15).
Hann skal leiða tykkum í allan sannleikan.

**Jóhannes 16 vers 12** *Eg havi nógv at siga tykkum enn, men tit fáa ikki borið tað nú.*

Jesus hevði longu sagt teimum: *"Alt tað, sum Eg havi hoyrt av Faðir Mínum, havi Eg kunngjørt tykkum"* (Jóh.15.15). Men hetta vóru lærisveinar hansara, ikki mentir at bera.

Harrin var byrjaður at læra teir stórar sannleikar:

1. um "bótardeyðan Kristusar," (Yom Kippur, 3.Mós 16)),
2. um "at verða í Kristusi, og Kristus í tykkum"
3. um "samkomur Kristusar,"
4. um "afturkomu Kristusar"
5. og aðrar sannleikar um Kristus.

Soleiðis var spírin til sannleikar Kristusar, kunngjørdir lærisveinunum.
*Men tit fáa ikki borið tað nú.* Men Heilagi Andin*, skal leiða tykkum í allan sannleikan.* Heilagi Andin var mentur at bróta inn í eitt nýtt tíðarhúshald, *náðiárið Harrans, fylling tíðanna,* (Luk.4.19, Ef.1.1), Andin skuldi koma tann 50. dagin, pinsadag, har Ísrael fór at verða sett til síðis, og samkoma Guds, ein útvaldur flokkur av øllum, sum trúgva, bæði av Jødum og heidningum, skuldi byrja eitt nýtt tíðarskeið. Heilagi Andin fór at gera nakað nýtt. Hann fór at doypa trúgvandi inn í samkomuna, sum er loyndarmál likam Kristusar (Kol.1.24-27):

Dópur heilaga Andans:

1. Framtíð: *Tit skulu <u>verða</u> doyptir í Heilaga Andanum,* (Áp.1.5).
2. Ápostlasøgan: (Jerúsalem (2.1-4), Samaria (8.17). Heidningar (10.44).
3. Tátíð: *Tí við einum Anda <u>vórðu</u> vit jú øll doypt at vera eitt likam, annaðhvørt vit nú eru Jødar ella Grikkar,* (Áp.1.5, 1.Kor.12.13).

Heilagi Andin skuldi takað bústað í teim trúgvandi. Andaligar førleikar, gávur og evnir fór Andin eisini at leiða teir inn í, og tala fyri teimum og kunngera teimum allan sannleikan. Fedrar teirra vóru heldur ikki førir fyri at bera hetta: *Hví freista tit tá nú Gud við at leggja ok á háls lærisveinanna, sum hvørki fedrar okkara ella vit hava verið mentir at bera!* (Áp.15.10).

—----------------------------------------------
**Heilagi Andin skuldi koma**

**Jóhannes 16 vers 13a**
*Men tá Hann, Andi Sannleikans, kemur, skal Hann leiða tykkum í allan sannleikan,*

Harrin gav teimum lyft um, at teir fóru at skilja teir andaligar sannleikar, sum nú vóru teimum kámir og torskiltir. Tað var hetta Harrin tosaði um, sannleikans opinbering, við eini stigvísari framgongd. *"Men táið Hann, Andi sannleikans, kemur, skal Hann leiða tykkum í allan sannleikan."* (V.13a). Orðið, at leiða (hodegeo, hoddegæo, leiddur á vegnum, vegleiða, vegvísari, guide).

**Andin leiddi Filip til oyði stað**
Mundu nakar av okkum fari at leitt Filip burtur frá einari stórari veking í stóra kenda Jerúsalem, út á ein oydnan veg?
Hetta var júst tað, sum Heilagi Andin gjørdi. *Eingil Harrans talaði til Filip* (Áp.8.26).
Hirðmaðurin, fíggjarmálaráðharrin úr Etiopia, segði við Filip: *"Hvussu skal eg kunna tað, uttan onkur vegleiðir meg!"* (hodegeo, sama orð, sum nýtt um, at Andin leiðir). *Tá læt Filip upp munnin...* (Áp.8.31,35).

—------------------------------------
Sama orðið, (at leiða) er nýtt um blóðvitnini, sum koma út úr trongdini: *"Tí lambið, sum er mitt fyri hásætinum, skal verða hirði teirra og leiða tey… "* (Op.7.17).
Andi sannleikans skuldi leiða teir. Jesus var bæði vegurin og sannleikin, og nú skuldi Andin koma at vísa vegin, og leiða teir *"í allan sannleikan*."
Vit kunnu av sonnum siga við Dávidi: *"Harrin er hirði mín…. Hann leiðir meg at hvíldarvøtnum"* Sálm 23.
Heilagi Andin opinberaði, ella lat upp so við og við sannleikar, sum blivu samlaðar í Nýggjatestamentið. *"Andi sannleikans"* tók holdgjørda orðið, Jesus (Jóh.1.14, 14.6), og goymdi tað sum største dýrgrip, við tí skrivaða, livandi orðinum, sum koma skuldi, orð Guds: *"drivnir av Heilaga Andanum"* (1.Pæt.1.11, 2.Pæt.1.21, 2.Tim.3.16).

—-----------------------------------
**Heilagi Andin skuldi koma**

**Jóh.16.13b**

*"Tí Hann skal ikki tala av Sær sjálvum, nei, tað, sum Hann hoyrir, skal Hann tala, og tað, sum koma skal, fer Hann at kunngera tykkum."* (v.13.b).
Andin skuldi ikki bert leiða teir í allan sannleika, nei, Hann skuldi eisini kunngera teimum tað, sum koma skuldi. Meginreglan var tann sama sum hjá Harranum Jesusi: *"tí alt tað, sum Eg havi hoyrt av Faðir Mínum, havi Eg kunngjørt tykkum."*
Fyrst Faðirin, so Kristus, so Heilagi Andin.
Her var eingin tilvild. Jesus Kristus og Heilagi Andin talaðu tað, sum teir hoyrdu.
Altíð tvey ella trý vitni. Men her vóru trý vitnir:
Faðirin, Kristus og Heilagi Andin.
Táið Jesus var her á jørð, hoyrdi hann Faðirin og Andan, *Andi Harrans er yvir Mær* (Luk.4.18), ..*tí alt tað, sum Eg havi hoyrt av Faðirinum* (Jóh.15.15). Nú Andin er her, hoyrir Hann Faðirin og Harran Jesus, síðani talar Hann, sama orð kemur út úr hini somu krystal kláru keldu sannleikans:

*Orð HARRANS eru rein orð, lík hinum reina, sjey ferðir reinsaða silvuri.* (Sálm 12.7).
*Orð Títt er væl reinsað; tænari Tín elskar tað.* (Sálm 119.140).

"Jesus segði: Orð Títt er sannleiki." (Jóh.17.17).
Heilagi Andin, sum koma skuldi, opinberaði loyndarmál Kristusar, samkomuna (Matt.16.-18, Kol.1.26). Harrin Jesus Kristus lærdi teir nakað, sum teir ikki vóru mentir at bera, tí skuldi Andi sannleikans hjálpa teimum víðari *"men tit fáa ikki borið tað nú."* Heilagi Andin skuldi gera tað óskilliga skilligt, tað sum var í brotum skuldi fáa enda og gerast til eina heild, hitt ófullkomna skuldi fullkomast, tað óbúnaða skuldi gerast búgvi, tað óklára gerast klárt, týðiligt, skilligt og greitt (1.Kor.13.8-12).

—-----------------------------------------------

**Heilagi Andin skuldi koma**

**Jóhannes 16 vers 13c**
*“Og tað, sum koma skal, fer Hann at kunngera tykkum.”*

Heilagi Andin skuldi eisini kunngera og opinbera teimum tað framtíðar profetisku ætlan, sum vit finna í læru Jesusar og í brøvum ápostlanna og serliga í Opinberingini. *Tað, sum koma skal.*

Sami Heilagi Andi, sum innblásti Gamlatestamentið, skal nú eisini innblása, evangeliini, Ápostlasøguna, brøv ápostlanna og Opinberingina, ja, alt Nýggjatestamentið:

<u>Evangeliini, tað sum var:</u>
Talsmaðurin sum Faðirinum skal senda, *“Skal læra tykkum alt og minna tykkum um alt, sum Eg havi sagt tykkum.”* (Jóh.14.26).

<u>Ápostlasøgan: Teirra nútíð:</u>
Talsmaðurin frá Faðirinum, *“Hann skal vitna um Meg. Og eisini tit skulu vitna; tí tit hava verið við Mær frá upphavi.”* (Jóh.15.26-27).

<u>Brøvini, frameftir:</u>
*“Eg havi nógv at siga tykkum enn, men tit fáa ikki borið tað nú. Men táið Hann, Andi sannleikans, kemur, skal Hann leiða tykkum í allan sannleika.”* (Jóh.16.12-13).

*Opinberingin:*
*“Og tað, sum koma skal, fer Hann at kunngera tykkum. Hann skal dýrmeta Meg, tí Hann skal taka av Mínum og kunngera tykkum.”* (Jóh.16.13-14). Jeus sjálvur tosaði nógv um *“tað,sum koma skal,”* serliga tá á Hann var á Oljufjallinum saman við teimum (Matt.24). Heilaga Andanum opinberaði ápostlunum meiri um *“tað, sum koma skal.”* serliga í Tessalonika brøvunum, og í Opinberingini.
Jesus segði, at Heilagi Andin skuldi fyrst og fremst, *“dýrmeta Meg, tí Hann skal taka av Mínum og kunngera tykkum”* (Jóh.16.14-15). Kristus, alt í øllum (Ef.1.19-23).
Hetta er soleiðis ein málistokkur fyri tey, sum eru fylt av Heilaga Andanum:
Tey dýrmeta Kristus, ikki seg sjálvi, (okkum). Heimurin dýrmetur als ikki Kristus Jesu.
Heimurin er framvegis sami heimur og broytist ikki, í hvussu er, ikki til tað betra.
Men skjótt fóru menniskjuni at spýta Hann í andlitið, blinda Hann og sláa Hann við rørstavi, lata Hann í reyðan kappa til spott, og krýna Hann við tornakrúnu. Tey krossfesta og háðaðu Hann, spottaðu og hildu Hann fyri gjøldur, líka til Hann doyði. Men Jesus sá fram um alt hetta og sá dýrdina fyri framman. Triðja dagin reis Hann upp aftur, og 40 dagar seinni, kristihimmalferðardag, fór Hann upp til himmals, upp í og til dýrd

(Áp.1.19-10, Heb.1.3). Og 10 dagar seinni, pinsadag, skuldi Heilagi Andini byrja nýggja uppgávu, at dýrmeta Hann, gjøgnum læru Kristusar við ápostlunum, í framtíðar profetiska ljósinum, til skjótt, nú 2.000 ár eru runnin, og Kristus, Messias skal koma aftur í dýrd, ikki sum Hann kom fyrru ferð sum offurlambið, til at doyggja á ein krossi, men sum dýrdarkongurin, hin rættvísi dómarin, til at fullkoma alla rættvísi, sum allur heimurin hevur rópt eftir.
Tá skulu tey, sum trúðu á Hann, sita í dýrd við Honum.
Men meðan vit bíða, kunnu vit verað “leidd í allan sannleika,” við at lesa og grunda á læru Kristusar, gjøgnum orð Hansara við Heilaga Andanum, og soleiðis fáa førleika og møguleika at dýrdargera Harran Jesus Kristus.

PMH Feb.2023